Føroya Løgting

Att: Fíggjarnevndin

Skriv til Løgtingsins fíggjarnevnd í samband við mál um tilfeingisgjald.

Felagi Garnaskip ynskir við hesum at gera vart við, at makrelkvotan, sum árliga verður latin garnaskipunum, er alt avgerandi fyri at fáa raksturin hjá garnaskipunum at hanga saman. Garnaskipini sum hava eina serliga langa søgu antin sum rækjuskip í Grønlandi, sum línuskip á Flemic Kap umframt Canada/New Foundlandi og sum ídnaðarskip í Norðsjónum og undir Føroyum.

Øll hesi skip eru so líðandi, av neyð, endaði sum garnaskip undir Føroyum eftir ávikavist Havtasku og Svartkalva, við einum fast ásettum garnatali á 1400 gørn. Sum árini eru liðin sæst tíðuliga, at als eingin menning hevur verið í hesum partinum av flotanum, har fleiri av garnaskipunum hava skift eigara einamest orsaka av vánaligum rakstri.

Tí var tað sera kærkomið, at tá tey fingu eina makrelkvotu ásetta, hóast hon var lítil; minni enn 200 tons fyri hvørt skip. Hugsa eigur at vera um, at hesi skipini hava verið í føroyska fiskiflotanum í mong ár, har tey hava tænt landi og fólki væl. Garnaskipini kundu hugsa sær at lati okkurt av garnaloyvinum inn og síðani fingið uppsjóvarloyvi í staðin, men hettar hevur tíverri ikki verið gingið á møti. Heldur tvørtur í móti eru nýggj uppsjóvarloyvið givin út. Tað er óskiljandi og tíðverri fakta.

Nú er so ætlanin at leggja eitt tilfeingisgjald á hesi fáu tonsini, sum garnaskipini hava. Tað er í sær sjálvum ein nógv størri skattahækkan, enn t.d. í mun til tey vælbjargaðu uppsjóðarskipini, sum hava 10.000 tals tons av kvotum og hvørt ár yvirstór yvirskot; óskiljandi. Og serstakliga óskiljani tá hugt verður eftir yvirskipaða politikkin hjá samgonguni, sum m.a. snýr seg um at geva lønarlyft til tey lægstu rók. At skatta tey skipini, sum hava forholds vánaligt og tunt tilverugrundarlag, er beint í andsøkn til tað lønarlyftið, sum annars nú verður givið til ávísar samfelagsbólkar. Beint øvugt verður nú hetta tilfeingisgjaldið, sum verður lagt á garnaskipini, ein beinleiðis orsøk til lønarlækking til garnaskipini og manningarnar á garnaskipunum.

Júst hetta tilfeingisgjaldið verður politiskt umrøtt sum ein skattur á ónormalan vinning. Í mun til garnskipini kann væl ikki vera talan um ein ónormalan vinning, tá hesi longu hava ein sera tungan rakstur, har øll garnaskipini eru um 60 ár ella meira. Hugsandi er, at talan má vera um eina politiska misskiljing, sum er í andsókn við politikkin hjá samgonguni, sum annars sýnist at vera, at javna út rættindi til ymsu bólkanar.

Garnaskipini hava ikki fingið nøkur nýggj rættindi at fiska, sum t.d. línuskipini hava. Tey hava seinstu árini fingið fleiri nýggj rættindi at veiða ymsa staðni uttanfyri Føroyar, herundir á Flemish Kap. Talan er um rættindi, sum okkurt av garnaskipunum annars upprunaliga hevur skaffa Føroyum søguligan rætt til. Harumframt hava línuskipini fingið rættindi í Grønlandi, har tvey av garnaskipunum høvdu rættindi, áðrenn tey komu til Føroya at royna við gørnum.

Tí vil Felagið Garnaskip innarliga heita á fíggjarnevndina um, ikki at leggja tilfeingisgjald á heimaflotan, sum búskaparliga er í tungum sjógvi. Vit halda, at tað er ein skeiv fatan at siga, at hettar er studningur; makrekvotan til garnaskipini er ein breiðkan av tilverugrundalagnum. Landstýrið keypir árliga rættindi frá eitt nú Russlandi og Norra umframt fra Grønlandi til ávísar skipabólkar, men tá eitur tað ikki stuðul. Tað er ringt at skilja hvussu politikkara onkutíð kunnu siga, at okkurt er stuðul, tá annað líknandi ikki er stuðul. Um makrelkvota er stuðul, so er Barenshavið, Ísland og Grønland væl eisini ein stuðul til raksturin hjá til reiðaríini.

Og harumframt at geva einum nýggjum aktøri, sum ongantíð hevur verið í vinnu, eina makrel- silda og svartkjaftakvotu er væl eisini stuðul so tað stendur eftir í, tá samanborið verður við hesar smáu kvotunar, sum garnaskipini fáa. Tað sýnist sum um, at kvotur fyri 1-2 milliónir er stuðul, í meðan tað ikke er stuðul, tá kvota fyri 100 milliónir verður latin til ein aktør. Bæði skipini byrja annars við einum tómum arkið og einum veiðiloyvið.

Við hesum vil Felagið Garnaskip innarliga heita á Løgting og Landsstýrið um at hugsa seg væl um og minnast til, at Føroyar er eitt norðurlendskt vælferðarsamfelag og ikki ein afrikansk bananrepublikk, har tilvildin valdar.

Vinarliga

Felagið Garnaskip

Felagið Garnaskip

At geva skipinum hóskandi rættindi so tey kunna dríva lønandi fiskiskap við tíðarhóskaðum skipum.

Sleppa inná aðrar fiskileiðir. Eittnú grynri vesturi á ryggjunum og Byro bank, og inn um limjuna suðuri av føroya banka sum er djúpari enn 500 m. Har er eitt olið sum svartkalvi er men er lukka uttanfyri 500m.

Fáa rættindi eins og línuskipini í Íslandi/Grønlandi ella aðrastanis.

At geva teimum uppisjóðarfisk í býti við at læta garna loyvið inn.

At geva einum garnaskipið íðnaðarloyvið við at læta garnaloyvið inn.

Sleppa at fiska torsk,upsa og longu uppá trolara fiskidagar.